# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Fyrsta messan hjá Mekonomen




Mekonomen framsýningarbussur inni á framsýningini




Framsýningin var í einum stórum tjaldi við handilin hjá Mekonomen

**Hálvtannað ár eftir at skandinaviska handilsketan Mekonomen læt upp í Føroyum, høvdu teir sína fyrstu messu í farnu viku.**

Framsýningin læt upp hósdagin 14. apríl í einum stórum tjaldi við handilin hjá Mekonomen við Hoyvíksvegin í Havn. Fyrstu tveir dagarnar var framsýning bert fyri verkstaðskundar, meðan opið var fyri almenninginum leygardagin. Petur Martin Johansen, stjóri í Mekonomen í Føroyum, sigur, at framsýningin var væl vitjað, og teir fingu víst sínar vørur fram fyri bæði verkstaðskundum og privatu kundunum.

Framsýningarbussurin hjá Mekonomen vitjaði kundar á meginøkinum, men ætlanin er, at bussurin skal koma aftur hendan vegin og vitja verkstaðskundar kring alt landið.

Mekonomen er størsta heilsøla í Skandinavia og er fimtistørsti innkeypari av eykalutum í Evropa. Í Mekonomen samtakinum eru meira enn 10.000 starvsfólk.

# ES stuðlar battaríiskiftistøðum




Better Place battaríiskiftistøð

Ein handilsfelagsskapur av fyritøkum sum t.d. Better Place, Teknologisk Institut, Renault, Continental, Ernst & Young og TÜV hevur almannakunngjørt at Evropakommissiónin hevur góðkent eina granskingar- og menningarverkætlan, sum skal gera tað lættari fyri europeisku bila- og battaríverksmiðjurnar at framleiða elbilar við skiftiligum battaríum.

Evropakommissiónin stuðlar verkætlanini við 2,2 milliónum evrum. Tilsamans 11 evropeiskar og altjóða fyritøkur og institutiónir eru við í hesum handilsfelagsskapi, sum hevur fingið navnið Easybat.

Samstarvið gongur út upp á at gera tað soleiðis, at standardkomponentar verða nýttir í framleiðsluni av elbilum og battaríum fyri at battaríini skulu passa til teir ymisku elbilarnar. Í framtíðini verður tað soleiðis, at elbilar og battarí skulu verða Easybat-kompatibul.

*Easybat standardisering av elbilum og battaríum*